# Fonn Flog eisini í Havn

**Beint eftir ólavsøku letur ferðaskrivstovan Fonn Flog upp deild í Havn**

FERÐING

Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

3. august hevur ferðaskrivstovan Fonn Flog 17 ár á baki, og henda dagin í ár letur fyritøkan upp nýggja deild í Havn.

Frammanundan hevur Fonn Flog deild bæði í Klaksvík og í Saltangará.

- Vit hava fleiri viðskiftafólk í Havn, og við at lata upp deild har geva vit teimum høvi til eisini at støkka inn á gólvið hjá okkum. Tað ber væl til at samskifta og bíleggja ferðaseðlar frá okkum um internetið, men tað verður ein fyrimunur fyri tey viðskiftafólkini, at tey eisini kunnu koma at vitja okkum, sigur Leivur Fonn, stjóri í Fonn Flog.

Tað er einki dulsmál, at orsakað av kreppuni, ferðast fólk ikki so nógv meira, men av tí at í Havn eru fleiri fólk við fastari og tryggari inntøku, hava fólk har betur ráð at ferðast, heldur Leivur Fonn.

Tey hava leingi hugsað um at víðka fyritøkuna við eini deild í Havn, og nú skal tað so verða. Tey hava valt at lata upp nýggju deildina 3. august, tí tað er dagurin, tá ið Fonn Flog byrjaði fyri 17 árum síðan.

Fonn Flog hevur leigað sær høli á Aarvegnum, og tað eru hølini, har Flogfelag Føroya hevði í sínari tíð.

Í sambandi við at Fonn Flog fær eina deild aftrat eru tvey fólk aftrat komin at arbeiða í fyritøkuni, sum nú hevur 16 starvsfólk.



*Hósmorgunin fleyt yvir hjá Heðini Mortensen. Um sjey tíðina hósmorgunin sóu starvsfólk hjá kommununi ung fólk, sum gjørdu herverk móti nýplantaðum trøum. Tey tóku myndir av unglingunum, herverkið varð meldað, og politiið tók dreingirnar*

# Herverk fær avleiðingar

**Hvørja ferð ótangar bróta trø og oyðileggja alt tað vakra í býnum, ætlar Heðin Mortensen at melda. Hósmorgunin var óboðið hjá borgarstjóranum**

UMHVØRVI

Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Tað hendir javnan, at blómukassar í miðbýnum í Havn verða koppaðir og trø brotin um náttina.

Hósmorgunin fleyt yvir hjá Heðin Mortensen, borgarstjóra í Havn.

Hann var nakað so harmur, tá ið hann sá eitt nú nýplantaðu trøini á Vaglinum verða brotin, og at stóru vøkru planturnar við Smiðjuna í Lítluvík verða brotnar.

Fyri tað mesta sær eingin, hvør framt hevur herverkið, men um sjey tíðina hósmorgunin var tað so heppið, at starvsfólk hjá kommununi vóru úti og sóu teir, sum gjørdu herverkið. Tey tóku myndir av unglingunum, herverkið varð meldað, og politiið tók dreingirnar.

Hetta er nakað, sum hendir javnan.

- Eg skilji bara ikki, at nakar fær seg til at gera seg inn á alt tað vakra í býnum, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at kommunan í hesum førinum fer at reisa endurgjaldakrav móti ótangunum, og tað verður eitt stórt endurgjaldskrav.

Heðin Mortensen heldur tað vera nógv fyri, at planturnar ikki kunnu fáa frið. Kommunan hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at planta fyri at fríðka um býin, og so finna fólk uppá at knúsa og bróta og skræða uppaftur.

– Tað er so syrgiligt, tí tað tekur langa tíð hjá plantunum at vaksa aftur. Nógv av arbeiðinum hava Ung í arbeiði gjørt, og so koma onnur ung og sorla alt, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at hereftir verður slíkt heverk meldað hvørja ferð.

– Vit vilja gera alt fyri at varðveita alt tað vakrar í býnum, og eg heiti inniliga á fólk um ikki at gera slíkt, sigur Heðin Mortensen.



STUÐULSFÓLKASKIPANIN FYRI BØRN SØKIR EFTIR
SJÚKRARØKTARFRØÐINGUM, PEDAGOGUM
ELLA FÓLKI VIÐ LÍKNANDI ÚTBÚGVING.
> Les meira á www.almannastovan.fo
stuðulsfólkaskipanin fyri børn
almannastovan@almannastovan.fo



Vit eru flutt oman í Kondittaríið
Ymisk tilboð HVØRJA viku
50% avsláttur av ávísum vørum
Júník
KOM INN Á GÓLVIÐ OG GER KVETTIÐ
Í miðbýnum
Tel. 32 13 00